ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

8. desember 2020
Mál: 20/00957-3
Tygara Skriv:
Viðgjørt: Poula Lervig

Nr. 050.20

Svar uppá fyrispurning eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um leiguútreiðslur av Barnaheiminum, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Á hvørjum og hvussu nógvum matriklum leigar Almannaverkið (Eind 10) hølir til Barnaheimið og aðrar stovnar undir tí?
2. Hvussu long eru hesi leigumál (eru leiguavtalurnar áramálssettar)?
3. Hvat er kostnaðurin av hvørjum einstøkum leigumáli?
4. Hvat er samlaði kostnaðurin av leigumálunum?
5. Er ætlanin at spjaða nøkur av hesum leigumálum runt landið?

Viðmerkingar:
Ein av mest átrokandi byggiverkætlanum í løtuni er byggingin av einum nýggjum tíðarhóskandi barnaheimi.

Síðsta samgonga arbeiddi við hesi verkætlan og kom í Løgtingið við einum uppskoti, men hetta fall við teimum grundgevingum, at verkætlanin ikki var nóg liðug ella nóg greið, og at samlaði kostnaðurin fór at verða alt ov stórur.

Fyri at hava bestu fortreytir fyri at trívast og mennast er av allarstørsta týdningi, at børn, ið eru sett heiman og fleiri við serligum avbjóðingum, hava innbjóðandi og haldgóðar umstøður at búgva. Í løtuni verða børn í fleiri førum flutt runt og inn á dýr og ivasom leigumál, har m.a. blámusoppur hevur verið ein afturvendandi trupulleiki.

Eitt sjónarmið, sum sitandi samgonga hevur ført fram fleiri ferðir undir viðgerðini av uppskotinum um at byggja nýtt barnaheim, hevur verið, at tað er ov kostnaðarmikið at fara í holt við hesa byggiverkætlan nú. Tí kundi tað verið áhugavert at fingið at vita, hvat samlaði kostnaðurin er av at halda til í hesum ymisku leigumálunum runt um í býnum ístaðin, soleiðis at tað er møguligt at samanbera tann kostnaðin við kostnaðin av at byggja eitt nýtt barnaheim.

Í frágreiðing sínari frá 2019 staðfestir Løgtingsins umboðsmaður, sum eisini er barnanna umboðsmaður, at stórur tørvur er á einum nútíðarhóskandi barnaheimi, har børnini kunnu fáa tær umstøður og ta viðgerð, umsorgan og tann stuðul, tey hava tørv á og rætt til eftir m.a. Barnarættindasáttmálanum. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Á Løgtingi, 26. november 2020
Djóni Nolsøe Joensen

Svar:

Til spurning 1-4

Niðanfyri er talva, sum vísir leigumál, longd á leigumálum, kostnaður av hvørjum einstøkum leigumáli og samlaði kostnaðurin av leigumálunum til stovnar undir eind 10:

Leigumál í 2020 Eind 10	**Kr./ár**	**Kr./mð.**	**Kr.pr.kvm.**	**Byrjar**	**Endar**	**Viðmerking**
Í Lágni 12	400.000	33.333	1.000	01.10.2019	01.08.2029	
Argjaboðagøta 7	600.300	50.025	1.035	01.10.2017	30.09.2022	
Niðaragøta 2H, 1 hm	96.000	8.000	1.103	10.08.2020	09.08.2022	
Eystan Heyg 17	238.350	19.863	1.050	01.10.2020	01.10.2025	Óuppsigiligt til 01.10.2024
Karlamagnusarbreyt 37	341.850	28.488	1.075	01.01.2021	01.12.2030	Óuppsigiligt til 01.11.2025
Karlamagnusarbreyt 16	76.500	12.750		01.11.2020	01.05.2021	Fyribils leigumál
Í alt	**1.753.000**					

Í umbúnað at leiga frá 1. apríl 2021	**Kr./ár**	**Kr./mð.**	**Kr.pr.kvm**	**Byrjar**	**Endar**	**Viðmerking**
Varðagøta 59				01.04.2021		Endalig avgerð ikki tikin
Varðagøta 36				01.04.2021		Endalig avgerð ikki tikin

Umframt omanfyrinevndu leigumál so nýtir Almannaverkið bygningarnar hjá Sjálvsognarstovninum fyri Føroya Barnaheim í Pedda við Steinsgøtu 10 til stovnar undir eind 10. Almannaverkið rindar ikki leigu fyri nýtslu av bygningunum.

Til spurning 5

Almannaverkið hevur ikki í løtuni í umbúnað onnur leigumál enn tey, ið eru nevnd í talvunum omanfyri.

Tórshavn, 8. desember 2020

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur

landsstýriskvinna